# Heimsmyndin hjá Tycho Brahe




Altjóða stjørnufrøðiár 11

**Pól Jespersen**



**Tycho Brahe ger sær egna geosentriska-heliosentriska heimsmynd. Eftir 21 ár á Ven kemur hann til ilnar við kongsvaldið og rýmir av landinum. Hann doyr í Prag í 1601**


Ovast á oynni Ven læt Tycho byggja borg, Uraniborg nevnd. Borgin stóð liðug í 1580. Har hevði hann observatorium og bústað. Í 1584 letur hann byggja serstakt observatorium, Stjørnuborg, bæði tí honum vantar pláss, og tí tólini seta serlig krøv, at standa trygg. Stjørnuborg var tí fyri ein part bygd undir jørð at verja tólini fyri vindi. Nú á døgum sæst nærum einki til alt hetta á Ven.

## Halastjørnan í 1577

Í 1577 sást ein halastjørna (komet) á luftini. Tycho Brahe eygleiddi hana gjølla og roknaði, at hon var nógv longri burtur enn mánin, og at hon var farin um rásirnar hjá fleiri gongustjørnum. Hon var so at siga farin ígjøgnum sferurnar uttan himpr (og uttan at nakar hevði hoyrt krytallsorl). Sum tann fyrsti skjýtur hann upp, at rørslan hjá halastjørnuni ikki kann verða upployst í sirkulrørslur.

Tycho Brahe tók ikki undir við heliosentrisku heimsmyndini. Hetta var tó ikki av átrúnaðarligum orsøkum. Ein orsøk kann vera, at Tycho var eygleiðari. Nátt eftir nátt sær eygleiðarin stjørnumeldurin, og sum tíðin líður, eisini árliga meldurin. Fyri eygleiðaranum sær tað út, sum jørðin er tann klettafasti miðdepilin, sum alt melur um. Dugnaligi undanmaður hansara í fornøld, Hipparch, var heldur ikki heliosentrikari.

Ein onnur orsøk er tann, at um so var, at jørðin mól um sólina, skuldi siktilinjan til onkra stjørnu, sum ikki var so langt burtur, broytst við árstíðini sammett við aðrar fjarari stjørnur. Tycho royndi at mála slíkar broytingar, men tað eydnaðist honum ikki. Fyrstur at ávísa hetta fyribrigdið, sum verður nevnt parallaksi, var Friedrich Bessel. Tað var í 1838. Lesarin kann royna at hyggja at einum fingri fyrst við vinstra eyga og so við høgra eyga og varnast, hvussu fingurin skiftir støðu sammett við lutir aftanfyri. Tycho hevði álit á egnum málingum. Hann kundi ikki vita, at stjørnurnar vóru so ófatiliga langt burtur, at sjálvt ikki hann, fremsti eygleiðari í samtíðini, var førur fyri at mála parallaksa.



**Heimsmyndin hjá Tycho Brahe. Jørðin er miðdepilin. Um hana mala sól og máni. Hinar gongustjørnurnar, allar uttan jørðin, mala um sólina.**

## Heimsmyndin hjá Tycho

Í 1588 setur Thyco Brahe upp egna heimsmynd, sum er eitt bland av geosentrisku og heliosentrisku heimsmyndunum. Jørðin er still. Mánin og sólin mala um jørðina, og hinar gongustjørnurnar - allar uttan jørðin - mala um sólina! Eitt sindur góðvarin man hann hava verið, tí til sín doyggjandi dag dugdi hann ikki at skilja, at hetta í roynd og veru var kopernikanska heimsmyndin.

## Tað treingist um hjá Tycho

Sømdir fekk Tycho góðar á Ven, so góðar, at sjálvt nútíðar granskarar kunnu øvunda honum tær. Árliga játtanin kundi verða roknað í prosentum av donsku fíggjarlógini! Við sømdunum fylgja skyldur, sum hann, lensharrin á Ven, ikki røkir. Í 1588 doyr Fríðrikur II kongur. Prinsurin (seinni Christian IV) er bara 11 ár. Í 1592 er krúnprinsurin á Ven og fegnast um tað, hann sær, men longu árið eftir er vátt komið í reiðrið. Hann hevur sæð gravstaðin hjá pápa sínum í dómkirkjuni í Roskilde. Har er stórt forfall, og hetta er ábyrgdarøki hjá Tycho. Klagað verður um vitan á Kullen, og bóndurnir á Ven klaga. Helst eru tað øvund og jantelóg, og hjá høvuðspersóninum eitt trupult sinnalag og vantandi fatan, hvussu ein sannur aðalsmaður eigur at liva, sum í 1597 noyða hann at rýma. 15. mars ger hann sína seinastu máling á Ven og fer so við húski til Rostock. Seinni er hann í Hamburg, Dresden og Wittenberg. Í juni í 1599 kemur hann til Prag og verður verandi har. Hann fær starv sum stjørnufrøðingur og støddfrøðingur á hovinum hjá Rudolfi II.

Tycho fekst eisini við at yrkja, t.d. yrkir hann um hetta mundið soleiðis:

"Danmark, hvad har jeg dig gjort, at bort så grumt du mig støder? Hvor kan, o fædreneland! du mig behandle som fjende? Løftet jeg har jo dit navn, det nævnes med hæder så vide, siig, kan du vredes fordi, min virken har kranset med ros dig? Siig, hvem af dine børn har givet dig mer vel i eje! Kan du vel vredes derfor, at højt på den hvælvede bue, Fædreneland! dit navn jeg skrev i de blinkende stjerner! Hvorfor nu støde mig bort? Engang vil du sikkert mig mindes: Kommende dage mit værd, min virken skal visselig fatte, børn af en senere slægt, på hvad jeg gav dig, skal bygge . . . "

## Tycho doyr

13. oktober í 1601 er Tycho til døgurða hjá aðalsmanninum Peter Vok von Rosenberg. Vanliga verður sagt, at Tycho heldur enn at kasta sær av vatninum kurteisliga varð sitandi og helt sær. At bløðran brast, og at hann doyði av hesum 11 dagar seinni 24. oktober í 1601 bara 54 ára gamal. Hann er grivin í Týn kirkju. Kona Tycho doyði í 1604 og varð grivin undir liðini á manninum. Í 1901 varð grøvin opnað. Eitt petti av skegginum og líkklæðinum varð tikið upp og goymt. Tá ið so toybilið kom ímillum eystur og vestur, læt kekkiska ríkið Danmark ein part av hesum tilfari, sum seinni er kannað bæði í Danmark og í Svøríki. Kanningarnar vísa stórt tungmetalinnihald, serliga av kyksilvuri, sum hann hevur fingið í seg tímar ella dagar, áðrenn hann doyði. Talan kann vera um ein eleksir, sum hann sjálvur hevur blandað. Aðrir møguleikar eru prostatasjúka, morð ella sjálvmorð. Vissa er mær kunnigt eingin enn.